Tilbúgvingarstovnur Føroya
Faroese Emergency Management and Inspection Agency

Tórshavn, 22. juni 2011

# Tey 11 boðini – vegleiðing og dømi um skipaða brunatekniska byggimálsviðgerð av eldhættisligum virkjum og goymslum.

*LTM: Listin er ikki ein  troyting av (S.F.) serfyriskipanum og/ella (T.F.) tekniskum forskriftum og viðger tí ikki brunatrygd út í æsir ella niður í allar smálutir.*

**1 Nýtsluendamál og hvat fyri serfyriskipan/ir (teknisk forskrift/er) er/u galdandi**

- Ídnaðar- og/ella goymslubygningar í einari hædd?
- Hvørjar nýtslur eru í bygninginum? (Rávørugoymsla, framleiðsla, goymsla av lidnari vørðu, uppløg, træ, eldfimur løgur, plastik, mjøl o.s.fr.)
- Er goymsluhædd yvir 6 m?
- Eru uttandura goymslur?
- Eru fleiri ymiskar byggingar á somu ogn?
- Skal ein partur av bygninginum viðgerast sambært KBB-99? Um ja, sí eisini tey 9 boðini!
- Hvat sigur kommunala byggisamtyktin (økisætlanin) um húsavídd og nýtsluendamál? (Sethúsaøki, vinnuøki o.s.fr.)
- O.s.fr.

**2 Fráleikakrøv og staðseting á grundøki**

- Er bygningurin staðsettur fyri seg sjálvan, burturfrá aðrari bygging, grannamarki og miðju á vegum ella gøtum við nøktandi fráleika?
- Er byggingin soleiðis háttað við fleiri bygningum, at hon skal skilast sundur í brunadeildir vegna sínámillum fráleikar?
- Hvørjum er bygningurin klæddur við?
- Hvussu høgur er bygningurin?
- Er neyðugt við eldslogaskermi (“flammeskærm”)?
- O.s.fr.

**3 Brunadeildir**

- Er brundeildin einans í veghædd?
- Er bygningurin sundurskilaður í brunadeildir, t.d. umsiting, rávørugoymslu, framleiðslu, goymsla av lidnari vøru?
- Eru rýmingargangirnir gjørdir sum brunadeild?
- Eru rýmingartrappur, trygdartrappur og lyftir í egnari brunadeild?
- Er lagt upp fyri brunaverju í hornagripum (vinkulsmitta), brunasmittu millum brunadeildir í ymiskum hæddum (høg/lá smitta)?
- Eru m.a. rúm og slokur til burturkast og skarn, fýrrúm, eldstaðir, rúmupphitingarútbúnaður, skorsteinar, luftnýggjanarútbúnaður, verkstaðir, serligar el-innleggingar, og aðrar skipanir í egnari brunadeild?
- O.s.fr.

**4 Krøv til hurðar, portur o.s.fr. í brunadeild**

- Hava hurðar, portur, lemmar v.m. nøktandi góðsku?
- Er krav um (ABDL) sjálvvirkandi hurðaafturlatingarskipan?
- Eru op til flutningsbond tryggjað við nøktandi afturlating?
- Hevur møguligt brandglas nøktandi góðsku?
- O.s.fr.

**5 Brandútlufting (brandventilation)**

- Er brunadeild størri enn 600 $m^2$?
- Víddin av opinum á brandútluftingini ABV?
- Er krav um mekaniska brandútlufting ABV?
- O.s.fr.

**6 Rýmingar- og bjargingarviðurskifti**

- Eru nøktandi tal av rýmingarleiðum frá tilhaldsrúmum?
- Eru rýmingarhurðar, rýmingargangir og rýmingartrappur umframt útgongdir (út- og niður á lendi uttandura) nóg breiðar?
- Er fráleikin millum rýmingartrappur og/ella útgongdir yvirhildin?
- Skulu rýmingargangir skilast sundur við royktættum hurðum við ABDL-skipan?
- Eru rýmingarleiðir greiðar?
- Lata rýmingarhurðar upp rættan veg?
- Er tal, stødd og plasering av bjargingaropum og upplating nøktandi?
- O.s.fr.

**7 Konstruktiónir og yvirflatur**

- Eru berandi húsalutir gjørdir úr nøktandi dimensiónum og við nøktandi brunatrekleika?
- Er krav til roykop í samband við manglandi berandi konstruktiónir?
- Eru krøv til veggja- og loftklæðingar og gólválegging nøktandi?
- Eru klæðingar uttan nøktandi?
- Eru klæðing niður á tekju nøktandi?
- O.s.fr.

**8 Brunatekniskar skipanir**

- Hvat fyri tekniskar skipanir skulu vera í bygninginum?
  - Hondsløkkiútgerð,
  - roykvarnari,
  - slanguskáp,
  - útgonguljós og neyðljós,
  - ávaringarskipan,
  - (ABDL) sjálvvirkandi hurða afturlatingarskipan,
  - (ABA) sjálvvirkandi brunaávaringarskipan,
  - (AVS) sjálvvirkandi sprinklaraverja,
  - (ABV) sjálvvirkandi brandventilatión,
  - (AGA) sjálvvirkandi gassmátari og
  - o.s.fr.

Tinghúsvegi 64 • FO-100 Tórshavn • Tlf. +298 356610 • Fax +298 356611 • tbsf@tbsf.fo • www.tbsf.fo

**9 Insatsmøguleikar fyri bjargingar- og sløkkiarbeiðið**

- Innkoyringarvegir til øki og atgongd til byggingina?
- Bjargingarøki, bjargingarmøguleikar uttanífrá?
- Sløkkivatn?
- Stigrør?
- Roykútluftan umvegis hurðar, vindeygu, roykop og (ABV) sjálvvirkandi brandventilatión?
- O.s.fr.

**10 Sløkkiútgerð og –evnir**

- Er neyðugt við serligari ástaðar- og/ella virkissløkkiútgerð?
- Er tað virkið ella kommunan, ið skal fáa neyðuga útgerð til vega (Neyðugt við dagføring av kommunalu brunasamtyktini)?
- Er neyðugt við serligum sløkkievnum? (T.d. syntetisk skúm)?
- Hondsløkkiútgerð?
- O.s.fr.

**11 Rakstrarreglur og rakstrar- og viðlíkahaldsætlan**

- Hvussu skal virkin brunatekniskur útbúnaður (brunatekniskar skipanir) kannast og røkjast?
- Hvussu verða húsalutir kannaðir og røktir?
- Hvussu eru arbeiðsgongdirnar á virkinum?
- Hvussu eru tilbúgvingarætlanirnar  fyri virkið og fyri tað kommunala sløkkiliðið?
- O.s.fr.

Tinghúsvegi 64 • FO-100 Tórshavn • Tlf. +298 356610 • Fax +298 356611 • tbsf@tbsf.fo • www.tbsf.fo